HAVSTOVAN
FAROE MARINE RESEARCH INSTITUTE

**Magnus Heinason – Túrfrágreiðing**
**Standard hydrografi. Túrur nr. 1726**
**Tíðarskeið 7/6-14/6-2017**

---

**Fólk frá Havstovuni:** Regin Kristiansen og Hjálmar Hátún.

**Ábyrgd:** Karin Margretha H. Larsen

**Endamál:** Endamálið við túrinum er at fylgja við broytingunum í havinum kring Føroyar og at leggja fortoyingar út. Túrurin er ein partur av teimum regluligu kanningunum eftir standardskurðunum, og er partur av FARMON verkætlanini.

**Reiðskapur:** Streymmátarar og útgerð at leggja út við. CTDin, lítla CTDin, útgerð til prøvataking og WP2-glúpur.

**Um túrin:** Vit fóru út hóskvøldið 8/6 kl. 2200. Siglt varð norður á standardskurð N til NWNI, (pos. 62°35N – 006°05V 150 m dýpi). Har løgdu vit eina rammu, við streymmátara, út. Síðan sigldu vit norður á NWNB (pos. 62°55N – 006°05V 986 m dýpi) har løgdu vit eina fortoying, við streymmátara, út. Á NWNJ (62°56,8N – 006°05V 1200 m dýpi) og NWNK (63°01,6N – 006°05V dýpi 1790 m) løgdu vit eisini fortoyingar út. Hetta gekk alt væl
Síðan gekk leiðin eystur á Fugloyartunguna, har vit løgdu tvær fortoyingar, við streymmátara út. TNGX (61°55,6N – 003°51,3V 748 m dýpi) og TNGY (61°57,5N – 003°56,1V 684 m dýpi). Her tóku vit eisini CTD støð við hvørja fortoying.
Haðani sigldu vit inn á Havnina, orsaka av tekniskum trupulleikum. Tá trupulleikarnir vóru loystir, fóru vit út og byrjaðu við Høgnaboða, at taka skurð E. Hesin skurður varð tikin heilt inn á Hetlendska landgrunnin. Haðani varð siglt suður á endan av skurði S, sum vit tóku móti Føroyum, og endaðu á Munkagrunninum. Á hesum skurði royndu vit eisini at fá eina rammu við streymmátara upp, sum ikki kom upp í 2016, men tað lukkaðist ikki.
Nú sigldu vit út í Bankarennuna, har vit løgdu tveir streymmátara út, NWFC (61°23,5N – 008°18,9V 844 m dýpi) og NWFB (61°25,0N – 008°16,9V dýpi 817 m). Her tóku vit eina CTD-støð, niður á 600 m, har lítla CTD-in var heft á CTD-ina til kalibrering.
At enda sigldu vit í Skopunarfjørð, har tveir glúpar blivu tiknir útfyri Lívfiskastøðini í Skopun at samanbera við prøvarnar frá Skopun. Her tóku vit eisini eina CTD-støð, har báðar CTD-irnar hingu saman. Vit sigldu síðani á Havnina, hagar vit komu týsdagin 13. juni kl 10.

**Prøvataking:** Við Seabird CTD-ini tóku vit 42 støðir og saltprøvar á 23 støðun. Við WP2 glúpinum tóku vit 21 støðir. Prøvar av tøðevni vórðu tiknir á støð S8. Prøvar av O-18 vórðu tiknir á støðunum E1, E2, S1, S2 og S8.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Saltprøvarnir verða analyseraðir í heyst og hinir prøvarnir í summar.

**Viðmerkingar:** Alt gekk væl og alt riggaði, sum tað skuldi á túrinum. Veðrið var gott allar dagarnar.

15-06-2017
Regin Kristiansen




Kósir og støðir á túri 1726